# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hevði Obama verið hvítur, hevði hann ongantíð verið komin so langt. Hansara húðalitur ávirkar fólk*

*(Geraldine Ferraro)*

# Nú endar hann í Hvítu Húsunum

**Tær stóru veddingarfyritøkurnar eru á einum máli um, at nú endar Barrack Obama í Hvítu Húsunum**



*Aftan á sigurin í Mississippi í gjár hevur Barrack Obama góðar møguleikar at koma í Hvítu Húsini*

*Mynd: AP*

Barrack Obama vann sum væntað greiðan sigur á uppstillingarvalinum í Mississippi í gjár. Hann fekk 59 prosent av atkvøðunum, og Hillary Clinton fekk 39.

Sigurin var sum nevnt væntaður, men sambært teimum stóru veddingarfyritøkunum hevði hann eisini avgerandi týdning fyri tey komandi uppstillingarvalini, og tær ivast ikki longur í, hvør kemur í Hvítu Húsini eftir valið í heyst. Veddingarfyritøkur sum Paddy Power og Intrade hava Obama sum greiðan vinnara, og hóast Landbrokes ikki er so sannførd, ivast tey har heldur ikki í, hvør hevur teir betru møguleikarnar.

Veddingarfyritøkurnar vænta, at Hillary Clinton fer at vinna tey næstu uppstillingarvalini, sum verða í Pennsylvania, Kentucky og West Virginia, men at tað kortini ikki verður nóg mikið, til at hon kann fáa líka nógvar valmenn sum Obama.

## Kann enda í gálganum tí hann er samkyndur

**Myndugleikarnir í Niðurlondum vilja ikki geva iranska Mahdi Kazemi uppihaldsloyvi og hótta við at senda hann heimaftur. Tað kann kosta honum lívið**



*Í dag brúka iransku myndugleikarnir stórar kranar at hongja fólk í*

*Mynd: AP*

Mehdi Kazemi er samkyndur maður. Í fleiri ár helt hann saman við einum iranskum manni, men hesin bleiv tikin, dømdur til deyða og avrættaður, tí hann var samkyndur. Undir avhoyringum hevði hann avdúkað, hvørjum manni hann hevði verið saman við.

Mehdi Kazemi fór til Bretlands í 2005 at læra seg enskt, men stutt eftir frætti hann, at vinmaður hansara heima í Iran var dømdur til deyða og tikin av døgum. Kazemi søkti um uppihaldsloyvi í Bretlandi, men fekk noktandi svar. Hann rýmdi til Niðurlond, tí tað hevði víst seg, at niðurlendsku myndugleikarnir vóru eitt sindur lagaligari enn teir bretsku.

Men heldur ikki har kann Kazemi fáa uppihaldsloyvi. Talsmaðurin hjá niðurlendska innanríkisráðnum sigur við Reuters, at Kazemi verður sendur aftur til Bretlands, haðani hann kom, og bretsku myndugleikarnir hava hótt við at senda hann til Iran.

Sakførarin hjá Mehdi Kazemi, Borg Palm, sigur við BBC, at tað er lítið at ivast í, at Kazemi fær somu lagnu sum vinmaðurin, kemur hann heimaftur. Iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, hevur sagt, at tað finnast eingi samkynd fólk í Iran.

## Hevur smíðað bát úr ølblikkum

**Ein 69 ára gamal japani ætlar sær at sigla úr Hawaii til Japan í einum báti, sum hann hevur gjørt úr gomlum ølblikkum. Báturin hevur hvørki motor ella segl**




*Sunnudagin loysir Kenichi Horie og fer undir teir 3.400 fjórðingarnar úr Hawaii til Japan. Hann væntar at verða frammi um mánaðarskiftið mai-juni*

Gongur tað, sum tann 69 ára gamli Kenichi Horie ætlar, fer ferðin úr Hawaii til Japan at taka hálvan triðja mánað. Men hetta er ikki nakar vanligur túrur. Í fyrra lagi hevur hann smíðað bátin úr tómum ølblikkum, og í øðrum lagi er tað hvørki motorur ella segl, men alduorka, sum gevur bátinum ferð.

Kenichi Horie er umhvørvisvinur, og ferðir millum Hawaii og Japan er ikki hansara fyrsta „grøna" ferð á sjónum. Í 1992 sigldi hann úr Hawaai til japonsku oynna Okinawa við einum báti, sum sigldi við pedalorku. Fýra ár seinni, í 1996, var hann aftur á ferð, og hesaferð sigldi hann tvørtur um Kyrrahavið bið einum báti, sum sigldi við sólorku. Tann báturin var eisini smíðaður úr ølblikkum.

STUTT SAGT

## Tvey morð afturat

Fransmaðurin Michel Fourniret, sum er skuldsettur fyri at hava dripið sjey fólk, er nú undir illgruna fyri at hava myrt tvey fólk afturat. Franska løgreglan vil vera við, at tað var hann, sum neyðtók og myrdi ta 20 ára gomlu Joanna Parrish, sum varð funnin deyð í býnum Auxerre í mai í 1990. Harumframt heldur løgreglan, at tað var Michel Fourniret, sum beindi ta 19 ára gomlu, menningartarnaðu Marie-Angele Domece, sum hvarv í 1988. Tann 65 ára gamli Michel Fourniret hevur játtað seg sekan í teimum sjey morðunum, sum hann skal í rættin fyri seinni í hesum mánaðinum.

## Úr skúlanum at giftast

Í Bretlandi hava myndugleikarnir illgruna um, at ungfólk av útlendskum uppruna, sum hvørva úr skúlanum, eru send av landinum og har noydd at gifta seg eftir boðum frá foreldrum og øðrum avvarandi. Tað sigur BBC, sum vísir til eina frágreiðing hjá einari tingnevnd, har sagt verður, at á hvørjum ári hvørva umleið 100 ungfólk av útlendskum uppruna úr bretsku skúlunum. Kanningar hava seinni víst, at nógv av hesum ungu eru endað uttanlands, og myndugleikarnir halda, at fleiri teirra verða noydd at gifta seg har.

## Rúsevni í tonsavís

Eftir minni enn einari viku hevur rúsevnaløgreglan í Algeria lagt hald á umleið fýra tons av rúsevninum kannabis á markinum millum Algeria og Marokko, skrivar AFP. Myndugleikarnir siga, at rúsevnið var á veg á marknaðin, og at tað helst hevði givið eigarunum nakrar milliónir dollarar í lumman. Umframt tey fýra tonsini av kannabis fann algeriska løgreglan trýggjar milliónir dollarar í einum bili, sum bleiv funnin á markinum við Marokko. Menninir, sum høvdu verið í bilinum, sluppu til rýmingar inn um marokkanska markið.